TING-HELLAN

# Høgni Hoydal - riddarin



– *Nú er Anfinn Kallsberg vorðin riddari av Dannebrog saman við Bjarne Djurholm. Hesin seinri hevur síðani h ímóti føroyskum fullveldi og virkað fyri »Nyordningen« hjá donsku stjórnini. Kosmetiskt hevur Anfinn av góður hon hjá heimastýrismanninum úr Kollafirði, men nú krakeleraði alt og Fólkaflokkurin hevur endaliga yvirgivið bandsvongurin í høvuðsstaðarøkinum søkti at nationala hermótinum, í Norðoyggjum og í Eysturoy - og sigraði*

**Vit mundu vera fleiri, sum fingu handan bankatoskin frá Hanusi hjá Nornasi í rangastrúpan hetta nú so famøsa gallakvøldið í Norðurlandahúsinum. Alt so sera væl fyriskipað, tænastan í heimsklassa, skráin løgd sum tað sømir seg, táið útlendskir oddvitar vitja og gastronomiin á so høgum støði, at drotningavitjanin fyri árum síðani, táið havhestarnir fóru sum gummibóltar eftir borðinum og syftust uppi undir ljósakrúnunum, eins og høvdu teir fingið eitt nýtt lív, næstan var farin í gloymskuna. Fyri eina stund í hvussu er. Kortini verða orðini hjá Katrini hjá Kristiani í Kvívík tó seint gloymd, táið hon eftir at hava nartlað sær eina flís av eini nátabringu, við fellikníyinum hjá manninum, og eftir at hava tugt og jaglað sollaleðrið í einar tíggju minuttir, segði tey ódeyðiligu orðini: »Veit ikki hvat tit gera, men nú svølgið eg.«**



Tórbjørn Jacobsen

Matinum bagdi onki hetta mánakvøldið, men politiski kosturin, sum snildisliga var flættaður inn í hátíðina, var herskin at svølgja, í hvussu er hjá andstøðuni á tingi, sum ongan lut eigur í hesum politiska sorgarleikinum, har viljaleysir menn hava avreitt tjóðarinnar rættindi, uttan somikið sum at fáa ein verð av flatbønum afturfyri.

Margretha tykist vera eitt skilafólk, rímiliga vitborin eisini, og hjá flestu føroyingum er kongshúsið ikki stóri trupulleikin, soleingi hendan støðan er veruleiki, at danska statsmaktin tvíheldur um føroyskar ognir, dygt stuðlað av ríkistrællunum í Javnaðar, - Sambands- og Fólkaflokkinum. Tó er tað undrunnarvert at hon ikki kubbaði kontroversiella sekvensin, sum ríkiskallarnir høvdu sníkt inn í røðuna, og sum eyðvitað mátti gerast ein kíli í politisku skipanini í Føroyum.

Finnur Helmsdal og Høgni Hoydal eru menn sum ríða sama dag sum teir saðla. Skjótir á knappunum. Og hetta varð sum at stinga frens. Alt hitt tvørpolitiska sambandsorkestrið er farið upp at gala. Og ímeðan Alfred Olsen, Anfinn Kallsberg, Jóannes Eidesgaard, Jóhan Petersen, Olav Enemoto, Jóhan Dahl o.a. nísta sum útløgukøttar í føstu, er málið vorði eitt slag av einum vandetta ímillum danska kongshúsið og Tjóðveldisflokkin. Og tað verður ongin leikur fluttur í tí talvinum. Pr. definitión. Táið kongshúsið ikki fær farið inn í ein partapolitiskan dialog. Harvið hvørvur tað orðaskiftið av sær sjálvum og tað mest áhugaverda í miðlunum gjørdist so, at formaður Tjóðveldisfloksins ikki úntist við at súpa í seg av royala herskapsborðinum umborð á "Dannebrog" - og varð uppeksponeraður sum riddarin av tí leivdu breyðflísini.

Eitt avboð til ein náttverða? Hví gjørdist tað nú meginsøgan á hesi drotningaferðini? Hví verða ljóskastararnir ikki varpaðir inn í reversini á tjóðskaparhetjunum, sum nú ganga lagghallar av donskum sildasalati, kongsins teknar, premieraðir fyri sítt góða starv, í royndini at gøllhalda føroyska matrikkulin í donsku ríkisskipanini?

Hugsi, at tað var Karl Marx sum segði hesi vísu orðini: "Søgan endurtekur seg altíð. Fyrstu ferð sum sorgarleikur. Aðru ferð sum skemtileikur." Hann mundi neyvan vita hvussu ósvitaliga rætt hann hevði, táið hugt verður at føroyskum fullveldispolitikki og politisku viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark.

Í 1946 vrakaði føroyska fólkið uppskotið hjá donsku stjórnini um eina heimastýrisskipan - og valdi loysing. Politisku flokkarnir í Føroyum lupu saman við donsku stjórnini frá sínum lyftum.

Danska stjórnin gjørdi saman við føroyskum politikarum ein sonevndan "Nyordning", ið var sama heimastýrisskipanin, sum varð vrakað á fólkaatkvøðuni 14. September. Øll segl vóru sett fyri at billa føroyingum inn, at hetta var eitt politiskt nýbrot - hóast talan var um greitt afturstig, í mun til tær heimildir, ið Løgtingið hevði vunnið sær stríðsárini.

Ongin ivast í, at føroyska fólkið valdi greiðan meiriluta fyri fullveldi á løgtingsvalinum í 1998. Í 2002 og 2004 somuleiðis. Men áðrenn samráðingarnar um fullveldissáttmálan nakrantíð byrjaðu, í 1999, bjóðaði táverandi forsætismálaráðharri Danmarkar, Poul Nyrup Rasmussen, føroyingum ein "Nyordning indenfor Rigsfællesskabet" ístaðin. Hyggjuráðini mundu vera, at føroyingar skuldu sleppa at halda fram við at skeldast um nakrar smávegis yvirtøkur, skuldu sleppa við dønum út í altjóða samráðingar ímeðan Danmark togaði allar sínar heimildir innaftur og staðfesti sítt fullveldi yvir Føroyum.

Uppskotið varð uttan himpr kolldømt og afturvíst. Av góðum grundum vildu Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin ikki nerta donsku nálganina við eini eldtong. Seinri umsetti Sambandsflokkurin tó danska útkastið til føroyskt (helst við góðari hjálp úr Danmark), gjørdi tað til eitt politiskt barn hjá sær, og rópti tað "Nýskipanaruppskotið".

Tað kollektiva politiska minnið er stutt, men øll munna hóast alt minnast, at táverandi løgmaður Føroya, Anfinn Kallsberg, boðaði frá, at hann ongantíð fór at góðtaka nakra avtalu, sum bygdi á, at vit høvdu meldað okkum inn í danska ríkið, tí sum hann segði, Føroya fólk hevði allan avgerðarrætt í Føroyum. Sama grundgevingin var brúkt táið hann sleit samráðingarnar við donsku stjórnina, og somuleiðis tá ið hann nakað eftir tað avlýsti fólkaatkvøðuna. Sum hann segði: "Við eini fólkaatkvøðu er stórur vandi fyri, at vit føroyingar verða trýstir og hóttir til at lima okkum inn í tað danska ríkið."

Nú, seks ár seinri, er "Nyordningen" hjá Poul Nyrup Rasmussen og harvið "Nýskipanin" hjá Sambandsflokkinum sett í gildi. Her er ikki eitt komma flutt síðani Nyrup lanseraði hugskotið av fyrstan tíð, og ongin hevur spurt fólkið í Føroyum, hvat tey munna halda um "nýggja" politiska grundvøllin, sum í bráðskundi varð ekspederaður ígjøgnum Løgtingið og Fólkatingið - fyri kortum.

Ájú, søgan enturtekur seg so sanniliga. Fyrstu ferð sum sorgarleikur. Aðru ferð sum skemtileikur. Og hetta er tragikomiskt skemt á høgum støði, nú fremsti forsprákarin fyri "Nyordningen", er sami løgmaður, Anfinn Kallsberg, sum fyri fáum árum síðani staðfesti alment, at hetta fór hann aldri at geva seg undir.
Nú er hann vorðin riddari av Dannebrog saman við Bjarne Djurholm. Hesin seinri hevur síðani hann kom í landsstýrið, fyri seks árum síðani, ikki gjørt annað enn stríðst ímóti føroyskum fullveldi og virkað fyri "Nyordningen" hjá donsku stjórnini. Kosmetiskt hevur Anfinn av góðum grundum roynt at hildið eina fasadu, sum tóktiskt meira national enn hon hjá heimastýrismanninum úr Kollafirði, men nú krakeleraði alt og Fólkaflokkurin hevur endaliga yvirgivið seg fyri áhaldandi danska trýstinum í stjórnarskipanarmálinum. Sambandsvongurin í høvuðsstaðarøkinum søkti at nationala hermótinum, í Norðoyggjum og í Eysturoy - og sigraði, so tað stendur eftir.

Í ár 2000 vitjaðu donsku kongshjúnini eisini í Føroyum. Tá boðaði Anfinn Kallsberg, táverandi løgmaður, danska Ríkisumboðnum frá, at ongir riddarakrossar skuldu býtast út undir vitjanini. Sjálvur hevði hann fingið boðið riddarakrossin, men sum hann tá tók til: "Eg fari ongantíð at taka av tilboðnum um at gerast riddari av Dannebrog. Eg standi jú á odda fyri einum meiriluta, ið ynskir fullveldi í landinum."

Jú, skemtiligt kann tað tykjast at vera, men er tað nú so skemtiligt táið til stykkis kemur?

Tíanbetur eru søgan og skjalagoymslur kannaðar